TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest, Bogi Johannesen, Bjarni Hammer
Kristin Michelsen, Alvi Mortensen og Anita Vibergsdóttir

Skrivari: Fróði Mortensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skattatølum Jan.-Aug. 2019/2020 | 2 |
| 2 | Fíggjarætlan 2021 -1. Viðgerð | 4 |
| 3 | Tvøroyrar Havn - Súpanarvíkin - vetrarlega fyri Thorshavn | 4 |
| 4 | Uppskot um liðuggerð av kaihylinum - kaikant í allari Súpanarvík | 6 |
| 5 | Umsókn, um at keypa innbúgv til frítíðarskúlan | 7 |
| 6 | TB-Flogbóltur umsókn um stuðul | 8 |
| 7 | Nýggjur skúli - bygging | 9 |
| 8 | Rakstrarstuðul til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn | 11 |
| 9 | Brandbilur -keyp av stigabili | 12 |
| 10 | Kommunuval 10. november 2020 | 14 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.34.00-1-20**

## 1. Samanbering av skattatølum Jan.-Aug. 2019/2020

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 17.september 2020**
Samanbering av skattainntøkum mnd. jan.-aug. 2020/2019. Tvøroyrar kommuna hevur eina framgongd fyri aug.mnd. uppá 6,79%, og fyri ári (jan.-aug) 1,14%.

**Fyribilsskattur til kommunurnar í august:**

| Kommuna: | 2019 | 2020 | Munur kr. | Munur % |
|---|---|---|---|---|
| Fugloyar | 183.349 | 134.066 | -49.283 | -26,88 |
| Viðareiðis | 903.566 | 959.337 | 55.771 | 6,17 |
| Hvannasunds | 1.310.257 | 1.179.186 | -131.071 | -10,00 |
| Klaksvíkar | 16.316.023 | 16.054.885 | -261.138 | -1,60 |
| Kunoyar | 364.716 | 272.582 | -92.134 | -25,26 |
| Fuglafjarðar | 5.101.435 | 4.969.788 | -131.647 | -2,58 |
| Eystur | 6.669.943 | 7.277.501 | 607.558 | 9,11 |
| Nes | 3.588.008 | 3.894.264 | 306.256 | 8,54 |
| Runavíkar | 12.618.959 | 12.784.944 | 165.985 | 1,32 |
| Sjóvar | 3.134.256 | 3.310.550 | 176.294 | 5,62 |
| Eiðis | 1.978.786 | 2.032.983 | 54.197 | 2,74 |
| Sunda | 5.696.028 | 5.802.777 | 106.749 | 1,87 |
| Kvívíkar | 1.792.143 | 1.920.806 | 128.663 | 7,18 |
| Vestmanna | 3.956.364 | 4.023.609 | 67.245 | 1,70 |
| Vága | 6.520.002 | 6.453.594 | -66.408 | -1,02 |
| Sørvágs | 4.353.891 | 4.054.079 | -299.812 | -6,89 |
| Sands | 1.544.426 | 1.441.522 | -102.904 | -6,66 |
| Skopunar | 1.186.378 | 1.155.546 | -30.832 | -2,60 |
| Skálavíkar | 367.499 | 344.881 | -22.618 | -6,15 |
| Húsavíkar | 345.756 | 288.067 | -57.689 | -16,68 |
| Skúvoyar | 103.051 | 96.689 | -6.362 | -6,17 |
| Hvalbiar | 1.790.655 | 1.858.000 | 67.345 | 3,76 |
| Tvøroyrar | 4.703.304 | 5.022.646 | 319.342 | **6,79** |
| Fámjins | 176.850 | 203.648 | 26.798 | 15,15 |
| Hovs | 246.393 | 289.693 | 43.300 | 17,57 |
| Porkeris | 868.665 | 860.098 | -8.567 | -0,99 |
| Vágs | 3.837.187 | 3.699.544 | -137.643 | -3,59 |
| Sumbiar | 886.281 | 811.628 | -74.653 | -8,42 |
| Tórshavnar | 66.219.917 | 67.545.249 | 1.325.332 | 2,00 |
| | **156.764.088** | **158.742.162** | **1.978.074** | **1,26** |
| | | | | |
| Landsskattur | 124.693.007 | 123.791.087 | -901.920 | -0,72 |
| Kirkjuskattur | 4.915.589 | 5.159.771 | 244.182 | 4,97 |
| Eftirlønarsk. | 31.635.844 | 33.744.813 | 2.108.969 | 6,67 |

**Fyribilsskattur fyri januar og august - samanlagt:**

| Kommuna: | 2019 | 2020 | Munur kr. | Munur % |
|---|---|---|---|---|
| Fugloyar | 1.495.565 | 1.464.517 | -31.048 | -2,08 |
| Viðareiðis | 9.879.057 | 9.375.743 | -503.314 | -5,09 |
| Hvannasunds | 10.365.959 | 10.575.920 | 209.961 | 2,03 |
| Klaksvíkar | 140.320.685 | 147.593.165 | 7.272.480 | 5,18 |
| Kunoyar | 3.642.329 | 3.685.915 | 43.586 | 1,20 |
| Fuglafjarðar | 44.703.077 | 46.700.939 | 1.997.862 | 4,47 |
| Eystur | 57.454.768 | 61.425.802 | 3.971.034 | 6,91 |
| Nes | 33.390.439 | 35.056.866 | 1.666.427 | 4,99 |
| Runavíkar | 110.233.715 | 116.532.730 | 6.299.015 | 5,71 |
| Sjóvar | 26.860.476 | 28.853.557 | 1.993.081 | 7,42 |
| Eiðis | 16.979.758 | 17.681.656 | 701.898 | 4,13 |
| Sunda | 49.214.667 | 48.781.311 | -433.356 | -0,88 |
| Kvívíkar | 15.670.350 | 16.552.021 | 881.671 | 5,63 |
| Vestmanna | 32.515.034 | 32.555.445 | 40.411 | 0,12 |
| Vága | 53.460.897 | 55.204.552 | 1.743.655 | 3,26 |
| Sørvágs | 32.339.191 | 32.341.163 | 1.972 | 0,01 |
| Sands | 11.667.160 | 11.901.439 | 234.279 | 2,01 |
| Skopunar | 10.334.972 | 10.949.555 | 614.583 | 5,95 |
| Skálavíkar | 3.807.507 | 3.738.662 | -68.845 | -1,81 |
| Húsavíkar | 2.233.161 | 2.431.041 | 197.880 | 8,86 |
| Skúvoyar | 807.497 | 829.343 | 21.846 | 2,71 |
| Hvalbiar | 15.004.888 | 15.632.965 | 628.077 | 4,19 |
| Tvøroyrar | 40.049.602 | 40.505.331 | 455.729 | **1,14** |
| Fámjins | 1.609.894 | 1.687.100 | 77.206 | 4,80 |
| Hovs | 2.123.893 | 2.106.900 | -16.993 | -0,80 |
| Porkeris | 6.776.521 | 7.129.559 | 353.038 | 5,21 |
| Vágs | 30.765.114 | 30.674.580 | -90.534 | -0,29 |
| Sumbiar | 6.627.265 | 6.542.216 | -85.049 | -1,28 |
| Tórshavnar | 543.966.543 | 571.649.717 | 27.683.174 | 5,09 |
| | **1.314.299.984** | **1.370.159.710** | **55.859.726** | **4,25** |
| | | | | |
| Landsskattur | 1.101.044.651 | 1.156.456.245 | 55.411.594 | 5,03 |
| Kirkjuskattur | 40.707.603 | 43.592.893 | 2.885.290 | 7,09 |
| Eftirlønarsk. | 260.525.449 | 280.254.021 | 19.728.572 | 7,57 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |










**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 1:**
Málið var kunna og tikið til eftirtektar. Málið verður beint í býráðið.

## Avgerð

Málið var kunna og umrøtt.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.30.00-2-20**

## 2. Fíggjarætlan 2021 -1. Viðgerð

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 21.09.2020**
Samb. teldpost frá TAKS 18.09.2020, er skattainntøkur fyri 2021 mettar at vera:

**Inntøkurgrundalag kr. 304.588.832.-**
Persónsskattur kr. 63.659.066,-
Pensionistafrádr. (335) kr. -1.005.000,-
Barnatal (386), frádr. kr. -2.702.000,-
P/F Skattur kr. 2.000.000,-
**Mettur skattur kr. 61.952.066,-**

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 2:**
Einmælt samtykt at varðveita sama skattaprosentið á 20.90% og barnafrádrátturin á kr. 7.000,-, sum var galdandi fyri ár 2019. -Fíggjarnevnevndin mælir til, at 2. viðgerð av fíggjarætlin verður avgreidd til býráðsfundin 28. Otober, har arbeiðsdagur verður lýstur í góðari tíð. -Málið verður beint í býráðið.

### Avgerð

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá Fíggjarnevndini og áseta fyri ár 2021 skattaprosentið at vera 20,9% og barnafrádrátt á 7.000,-

**08.02.06-G01-1-20**

## 3. Tvøroyrar Havn - Súpanarvíkin - vetrarlega fyri Thorshavn

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 12. mars 2020**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Frits Strøm vitjaði á býráðsskrivstovuni 11. mars, og handaði eitt skriv til kommunustjóran -vegns m/s Thorshavn-, við áheitan á Tvøroyrar kommunu um at betra um umstøðurnar og trygdina hjá m/s Thorshavn at liggja við bryggja.

**Tekniskur leiðari 10-09-2020**
Vísandi til punkt um at Hvítanesbrúgvin er í ringum standi, kann súpanarvík djúpast og so sleppur Thorshavn at liggja har fyri veturin

**. 15. september 2020, pkt. 3:**
Tekniskur leiðari 10-09-2020
Tað er stóru vági at lata Thorshavn liggja við brúnna á vetrartíð, bæði fyri brúnna og skipið. Mælt verður til at dýpa súpanarvík, og eftir samskifti við kaifúta JBG, er talan um minni økið á botni, fyri at sleppa inn at leggja til kai. Arbeiði kann gerast av lokalum veitara sum eitt roknings arbeiði á minni enn 50.000,- við mettum vága á 50%. Peningur til hetta kemur fá konto 719 (løgujáttan Tvøroyar havn).

**Vinnu- og havnanevnd, 15. september 2020, pkt. 3:**
Nevndin tekur undir við, at arbeiðið verður sett í gongd.

**Kommunustjórin 21.09.2020**
Ongir játtan er avsett á FÆ2020 til hetta arbeiði, ið -um samtykt av fíggjarnevndini- krevur eykajáttan og 2 samtyktir í býráðnum.
FÆ2020 §719 -íløga Tvøroyrar Havn -avsett kr. 2.030.000,-, (Zinkanodir)
FÆ2020 §721 -íløga bátahavnin -avsett kr. 1.500.000,- (Bátabrúgvar á Tvørabakka)

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 5:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælið hjá vinnu og havnanevndini. -Málið verður beint í býráðið.

## Avgerð

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**08.03.00-I00-1-19**



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## 4. Uppskot um liðuggerð av kaihylinum - kaikant í allari Súpanarvík

### Málsfrágreiðing

Tekniskur leiðari 10-09-2020
Ein avslutningur manglar á kaikantin í allari Súpanarvík og fyriliggur eitt uppskot frá Viðberg Sørensen.
Hesin partur av kai'ini burdi verið gjørdur og fyri at fara víðari, verður mælt til, at ein upphædd verður sett av til fyrireiking og kostnaðarmeting.

**. 15. september 2020, pkt. 1:**
Mælt verður til at seta av 150.000,- til fyrireiking av arbeiðinum.
Peningur kann útvegast frá 719 (Løgujáttan Tvøroyrar havn)

**Vinnu- og havnanevnd, 15. september 2020, pkt. 1:**
Nevndin mælir til at seta penning av til forkanningar og kostnaðarmeting.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Kommunustjórin 21.09.2020**
Ongir játtan er avsett á FÆ2020 til hetta arbeiði, ið -um samtykt av fíggjarnevndini- krevur eykajáttan og 2 samtyktir í býráðnum.
FÆ2020 §719 -íløga Tvøroyrar Havn -avsett kr. 2.030.000,-, (Zinkanodir)
FÆ2020 §721 -íløga bátahavnin -avsett kr. 1.500.000,- (Bátabrúgvar á Tværabakka)

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 4:**
Anita Vibergsdóttir gjørdi av ikki at luttaka í málsviðgerðini og fór av fundinum. Fíggjarnevndin er av tí áskoðan, at her er talan um eina størri verkætlan, sum umfatar allan miðbýin. Mælt verður til, at ein nevnd verður sett av komandi býráðið, sum arbeiðir víðari við einari heildarætlan fyri allan miðbýin.

### Avgerð

**Uppskot B:** Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bogi Johannesen, Bjarni Hammer skjóta upp, at ein arbeiðsbólkur verður settur, sum skal koma til býráðið við einum uppskoti at taka støð til, sum allir partar kunna liva við. Uppskotið skal taka støðu í at kajhylurin verður varðveittur.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Limir í arbeiðsbólkinum vera:
- Linn Augustinussen, Tekniskurleiðarin
- Fróði Mortensen, Kommunustjórin
- Lasse Jensen, Málsviðgerði
- Jón Bogi Guttesen
- Ólavur Bjarkhamar
- Magnus Jespersen
- Viberg Sørensen
- Leivur Nygaard
- Jógvan Martin
- Beinur Debes

**Uppskot A:** Alvi Mortensen leggur fram tilmælið saman við Anitu Vibergsdóttir og Kristin Michelsen at bátahylurin verður varðveittur og skjýtur upp, at fari verður í gongd við at liðuggera kajhylin í trá við ætlanina, sum var gjørd samb. semjuna millum Tvøroyrar kommunu og Søvn Landsins, tá Varðin Pelagic var bygdur.

**Atkvøtt verður um uppskot A**
Fyri eru: Kristin Michelsen, Alvi Mortensen og Anita Vibergsdóttir
Ímóti eru: Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest, Bogi Johannesen, Bjarni Hammer
Uppskot A er fallið við 4 atkvøðum ímóti, 3 atkvøðum fyri og ongari blankar

**Atkvøtt verður um uppskot B**
Fyri eru: Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest, Bogi Johannesen, Bjarni Hammer
Ímóti eru: Kristin Michelsen, Alvi Mortensen og Anita Vibergsdóttir
Uppskot B er samtykt við 4 atkvøðum fyri, 3 ímóti og ongari blankari.

**28.00.00-1-20**

## 5. Umsókn, um at keypa innbúgv til frítíðarskúlan

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 15.09.2020**
Leiðarin av Mýrifípuni, hevur gjørt var við at tørvur er á innbúgvi til frítíðarskúlan.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Sosiala nevnd, 21. september 2020, pkt. 4:**
Einmælt samtykt at ganga tilmælinum hjá leiðaranum í Mýrifípuna á møti.

**Kommunustjórin 21.09.2020**
Játtan er avsett á FÆ2020 §312, kr 50.000,- til slíka íløgu.

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 7:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá Sosialunevnd.

**Avgerð**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá fíggjarnevndini

**18.20.00-2-20**

## 6. TB-Flogbóltur umsókn um stuðul

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 09.08.2020**
Umsitingin hevur móttikið umsókn frá TB-Flogbólti um stuðul á kr. 150.000,- um ári. Felagið upplýsir m.a. í umsóknini at:

*"TB-flogbóltur hevur umleið 200 limir, íroknað hvílandi limir og leikarar frá 6 ára aldri til meistaradeildina.*
*TB-flogbóltur hevur altíð lagt stóra orku í ungdómsarbeiðið. Hetta sæst aftur í okkara avrikum, har TB KIDS – tey smáu børnini frá útibarnagarði til 4. flokk - hava klárað seg væl – tey eru fremst í øllum árgangum.*
*Sum liður í menningini av leikarunum í TB-flogbólti, hevur TB-flogbóltur havt ein sáttmála í 2 ár við Mirko Ristovic. Vit meta, at Mirko hevur ment okkara felag og okkara leikarar, og vilja tryggja okkum, at okkara evnaríku leikarar halda fram at íðka flogbólt, har bæði leikarar og felag eru í støðugari menning. Vit eru væl nøgd við arbeiðið, ið Mirko hevur gjørt í felagnum, og eru vit í samráðingum um at longja sáttmálan"*

**Mentanarnevndin, 17. august 2020, pkt. 6:**
Málið verður útsett til næsta fund í MN.

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Kommunustjórin 27.08.2020**
Ongir pengar eru avsettir til TB-flogbólt á FÆ2020. Tó er avsett á FÆ2020 §524 (Stuðul til ítrótt kr. 780.000.-) -pr. d.d. er eftir á §524 kr. 258.000-. Stuðulin til TB flogbóltur 2019, var kr. 110.000,-.

**Mentanarnevndin, 21. september 2020, pkt. 2:**
Samtykt er at tað ikki ber til at stuðla yvir fleiri ár, og at veita ein stuðul á kr. 130.000,- fyri ár 2020, sum er ein hækking samanborið við ár 2019, har stuðulin var kr. 110.000,-

**Kommunustjórin 21.09.2020**
Ongir játtan er avset á FÆ2020 til hetta arbeiði, ið -um samtykt av fíggjarnevndini- krevur eykajáttan og 2 samtyktir í býráðnum.
FÆ2020 §524 Stuðul til ítrótt avsett kr. 780.000.-,

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 8:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. -Málið verður beint í býráðið.

### Avgerð

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**20.30.00-A00-1-18**

## 7. Nýggjur skúli - bygging

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 4. november 2019, pkt. 11:**
MN einmælt samtykt, at MN og nýggja leiðslan í Tvøroyrar skúla, saman við fork. í skúlasýrinum vitja hjá Brim arkt. í 1 kv. 2020, fyri at viðgera/endurskoða uppskotið við ætlitið til tíð og tørv. Ynskið er eisini at vitja skúlar/stovanar á støðd við ætlanina hjá TVK.

**Kommunustjórin, 10. januar 2020**
Samskipa túrin norðureftir fyri at fáa íblástur til nýggjan skúla, við fundi/prát við arkitektafyritøku og evt. byggiharra. -Støða skal eisini takast til, hvør skal luttaka úr umsitingini, býráðnum,

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

skúlastýrinum og skúlanum.

**Mentanarnevndin, 13. januar 2020, pkt. 5:**
Einmælt samtykt at fara á vitjnarferð týsdagin 24.mars 2020. Kommunustjórin leggur túrin til rættis.
Mentanarnevndin leggur upp til at lutakarar verða skúlaleiðsla, skúlastýrið, mentanarnevndin, tekniskadeild -nýggur teknisklueleiðari-, borgarstóri og kommunustjóri.

**Kommunustjórin 12. juni 2020**
Umsitingin og býráðslimir var á námsferð fyri at fáa íblástur til skúlabygning á Tvøroyri -vitja og síggja nýggjar skúlar í Føroyum. Túrurin var ónsdagin 10. juni 2020, har BRIM arkitektar vóru vertir.

**Luttakarar fyri Tvøroyrar kommunu vóru:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri, Súsanna Bertholdsen, forkvinna í mentanarnevndini, Anita Vibergsdóttir, Mentanarnevndin, Bjarni Hammer, Mentanarnevndin, Jón Johannesen, Skúlastjóri, Otto Leo Gram, Varaskúlastjóri, Bjørg Hoffgaard deildarleiðari, Fróði Mortensen, kommunustjóri, Linn Mohr Augustinussen, tekniskur leiðari, Lasse Jensen, skrivari, -Umboð fyri skúlastýrið gav avboð.

<u>**Skrá og vitja var á:**</u>
Skúlin á Giljanesi - Skúlastjóri Annbritt Toftegaard, Skúlin við Streymin (og frokost) – Skúlastjóri Sonni Óli Djúrhuus, Á skúlatrøð í Klaksvík - Skúlastjóri Vagn Foldbo, Skúlin við Løgmannabreyt - Skúlastjóri Høgni Joensen

**Kommunustjórin 17.09.2020**
Mælt verður til at umsitingin og mentanarnevndin vitja skúlaleiðsluna í Tvøroyrar Skúla, fyri at tosa nærri um ætlanina at byggja nýggjan skúla, og fyri at viðgerða hvørjar tillagingar og ábøtur eru neyðugar at fremja á verandi skúla, sum ikki kunna bíða eftir at nýggjur skúli verður liðugur.

**Mentanarnevndin, 21. september 2020, pkt. 8:**
Jón Johannesen, skúlastjóri og Bjørg Hofgaard, deildarleiðari og Linn Augustinussen, leiðari av Tekniskudeild vóru á fundinum. Kommunustjórin greiddi yvirordnað frá um ætlanina at byggja ein nýggjan skúla, og Linn Augustinussen greiddi síðani frá um hvussu hugsanin er at koma víðari í hesari ætlan. Jón Johannesen metur at arbeiði hjá áhugabólkunum -funktiónsdiagrammini- sannlíkt skulu dagførast, tí hesi eru uml. 15 ára gomul. Avgjørt er, at ein nevnd verður sett sum tekur samanum gjørt arbeiði, og sum samskipar ætlanina víðari fram ímóti einari skitsu.

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 10:**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. -Málið verður beint í býráðið.

**Kommunustjórin 27.09.2020**
Mælt verður til at brúka part av íløgujáttanini §411 ætlað til nýggjan skúla, til ráðgeving og at savna saman higartil gjørt tilfar.

### Avgerð

Einmælt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, at heimila umsitingini at seta ein ráðgeva til at savna saman higartil gjørt tilfar at byggja nýggjan skúla, og at umsitingin fyrireikar málið til at vera framlagt á einum fundi í mentanarnevndini seinni í ár.

**19.03.00-Ø40-1-20**

## 8. Rakstrarstuðul til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 26. aug. 2020**
Nevndarform. fyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn søkir um at fáa útgoldið stuðulsjáttan til raksturin av savninum. Tvøroyrar kommuna hevur á Fíggjarætlan fyri ár 2020 játta stuðul á kr. 325.000,- til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn. Umsitingin hevur 17. september móttikið grandskoðan roknoskap fyri ári 2019, og mælt verður til at stuðul á kr. 225.000,- verður fluttur á konto hjá Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn.

<u>Rakstrarkonti §528 Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn útgreina:</u> (Játta í alt FÆ2020 kr. kr. 325.000,-)

- Rakstur: kr. 50.000,-
- Lønir: 175.000,-
- Umvælingar: kr. 100.000,- (Krevur útgreining/skjalprógv fyri umvæling)

**Mentanarnevndin, 21. september 2020, pkt. 10:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá kommunustjóranum at flyta stuðul á kr. 225.000,- til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn. Og at játtanin til umvælingar kr. 100.000,- vera fluttar sam. tilmælið um útgreining/skjalprógv, tá umvælingar eru framdar.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Kommunustjórin 21.09.2020**
FÆ2020 §528 (Tvøroyrar- Bygda- og Sjóvinnusavn) avsett kr. 325.000-.

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 11:**
Einmælt samtykt, at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. -Málið verður beint í býráðið.

**Avgerð**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá fíggarnevndini.

**14.05.02-1-20**

## 9. Brandbilur -keyp av stigabili

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 10.09.2020**
Átaksleiðarin hevur heitt á umsitingina um at viðgerða keyp av brúktum stigabili, sum Tórshavnar Sløkkilið letur selja, orsakað av teir hava keypt nýggjan. Anfinn Leo, átaksleiðari hevur í hesum sambandi vent seg til átaksleiðaran í Vági, Gudmund Jacobsen, og eru teir samdur um at her er talan um ein brandbil/stigabil, sum nøktar tørvin fyri alla Suðuroynna, og at bilurin er í góðum standi hóast at hann er 20 ára gamal.

Átaksleiðararnir mæla til, at hesin bilurin verður keyptur, og at hann verður partur av allari tilbúgvingini fyri alla Suðuroynna.

Keypsprísurin er kr. 350.000,-, og við tað at bilurin nærkast 20 árum, krevst eftirlit á henda, sum vantandi kemur at kosta kr. 300.000,- í komandi ár.

Kommunustjórin mælir til at fylgja tilmælið hjá Átaksleiðarunum, og avseta neyðuga játtan til keyp av hesum stigabilinum, sum teir metta nøkta tørvin, og sum beinanvegin kann verður virkin partur av tilbúgvingini í Suðuroynni, fyri eina lítla íløgu, samanborði við kostnaðin av tilsvarandi nýggjum bili. -Hetta er eisini er í trá við váðametingina í ávegis tilbúgvingarætlanina fyri Tvøroyrar kommunu, har víst verður á, at m.a. er stórur tørvur er á einum stigabili.

Støða skal takast til:

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

1. Um bilurin skal keypast?
2. Um bilurin verður keyptur í felag við allar kommunur í Suðuroynni. Hetta merkir, at keypið er tenkt av, at allar kommunur taka undir við hesum, og at hvør einstøk kommuna avsetur íløgu kostnaðin eftir einum býtislykli t.d. íbúgvum í hvørjari kommunu sær.
3. At Tvøroyrar kommuna keypir bilin, og ber alla íløgukostnaðin, fyri eftirfylgjandi at millumrokna við hinar kommunurnar, eftir sama leisti sum verður gjørt við Líkbilin.

Kommunustjórin vil gera vart við, at tað er sera umráðandi, at slík amboð vera knýtt at ávísum persónum, við røttum førleika, og sum fáa álagt ábyrgd av at útbúnaðurin verður royndur, soleiðis at hesin er virkin tá veruligi tørvur er. -Tí verður mælt til -um bilurin verður keyptur í felag- at tað frammanundan er gjørd avtala um hvør hevur ábyrgd av at røkja henda, og at ongin ivi er um, hvar bilurin kemur at standa.

Verður avgjørt at keypa bilin krevst eykajáttan. Fígging kann flytast av íløgum FÆ2020, sum enn ikki eru framdar.

**Tekniska nevnd, 15. september 2020, pkt. 5:**
**Kommunustjórin 21.09.2020** -fundurin, ið upprunaliga skuldi vera í Tekniskunevnd 15. sep., bleiv útsettur til 21. sep., men hesin var kortini ikki 21. sep. Kommunustjórin metur ikki, at hetta mál kann bíða enn 1. mnd, inntil fundur aftur er í Tekniskunevnd. Mælt verður tí til, at fíggjarnevndin tekur eina avgerð, sum hinar kommunurnar í Suðuroynni og seljarin av stigabilinum kann fyrihalda seg til.

**Kommunustjórin 21.09.2020**
Ongir játtan er avsett á FÆ2020 til hetta arbeiði, ið -um samtykt av fíggjarnevndini- krevur eykajáttan og 2 samtyktir í býráðnum.

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 12:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum, at Tvøroyrar kommunan keypir bilin, og eftirfylgjandi fær í lag gjaldsavtalu og samstarvsavtalu við granna kommunurnar í oynni. -Málið verður beint í býráðið.

## Avgerð

Einmælt samtykt at Tvøroyrar kommuna keypir stigabilin, og at umsitingin eftirfylgjandi samráðist við hinar kommunurnar í Suðuroynni, um at fáa í lag eina felags fígging av bilinum, soleiðis at stigabilurin verður partur av allari tilbúgvingini í Suðuroynni.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
| --- | --- |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**84.03.00-1-20**

## 10. Kommunuval 10. november 2020

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 27.09.2020**
Kommunustjórin mælir til, at valstaðið hjá Tvøroyrar kommunu til kommunuvalið, ið verður 10. november 2020, verður í skúlanum í Trongisvági, sum hevur verði vanligt seinastu nógvu árini.

### Avgerð

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá kommunustjóranum.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. september 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin**

**Fundur lokin 20:10**

Kristin Michelsen

Bjarni Hammer

Anita Vibergsdóttir

Bogi Johannesen

Alvi Mortensen

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen